# út at koyra

*Fyrsti japanski bilurin í Danska kongaríkinum kom til Føroya:*

# Hildu Bil-Óla vera svakan

## Japanskir bilar komu fyrst til Føroya

EIRIKUR LINDENSKOV

Hevði tú hug at fara undir at selja bilar í Føroyum fyri góðum tríati árum síðani, so tyktust møguleikarnir fyri at fáa fatur á einum umboði kanska ikki at vera stórir, tí tey allarflestu kendu evropisku og amerikansku bilmerkini høvdu sínar umboðsmenn í Føroyum.

Men hjá Bil-Óla funnu teir útav, at okkurt gloppið mundi vera eftir enn, og tikið varð til tey ráð, at venda sær til japansku bilverksmiðjuna Nippon og bjóða seg fram at umboða teir.

Japanarar tóku væl ímóti fyrispurninginum, og vóru sera fegnir um eisini at kunna selja bilar til Norðurlond, sum teir einki samband høvdu havt við áður.

Tann fyrsti japanski bilurin, sum yvirhøvur varð seldur til Norðurlond, kom til Føroya í 1962.


Hann varð nógv skoðaður, og líktist eisini frá bilum, sum tá vóru frammi. Føroyingar høvdu eitt nú ikki fyrr sæð bilar við littum rútaglasi, og nógv varð gitt um teir trupulleikar, sum fóru at standast av at skula fáa eykalutir til vega úr einum landi, sum lá hinumegin á jarðarknøttinum.

Tann fyrsti japanski bilurin í Norðurlondum var tann blái »Prince Skyline« persónbilurin hjá Óla Arge. Seinni komu fleiri persónbilar honum á baki, og ikki vardi leingi til teir fyrstu lastbilarnir komu.

Teir vóru av slagnum Clipper og Caball, og vístu seg at vera sterkir og vælegnaðir vøruvognar og hava verið at sæð í gøtunum fyri ikki so mongum árum síðani.

Saman við vælumtóktu Datsun 1200 og Datsun 1300 løgdu hesir bilarnir tað grundina undir umdømið, sum japanskir bilar fingu í Føroyum.

Í dag hugsa vit ikki um japansku bilarnar - teir eru ein nátúrligur partur í føroysku - og í alheims - bilaferðsluni.




*Óli Arge við fyrsta japanska bilinum, sum kom til Norðurlond. Hetta er ein »Prince Skyline«, seinni skiftið merkið navn til »Nippon«. Smádongurin í bilinum er ábbasonur Óla, Fiznbogi Arge, løgtingsmaður, sum í dag eigur fyritøkuna p/f Meinhardt Arge. Myndaánari: p/f Meinhardt Arge*

*At flyta inn bilar úr Japan var eitt ókent fyribrigdi fyrra partin í sekstiárunum. Í Danmark var hetta púra ókent, tá Óli Arge úr Havn keypti fyrsta bilin úr Japan. Danir spurdu seg sjálvar: »Er dette fornuft eller vanvid?«*

EIRIKUR LINDENSKOV

Nógv vatn er runnið í havið, síðan Just Sivertsen og Johannes Olsen keyptu fyrsta bilin til Føroya í 1922.

Í sekstiárunum vóru ikki nógvir bilar í landinum - kanska ikki fleiri enn eini 8% av tí,ið er í dag. Men tá gingu føroyingar eisini nýggjar leiðir.

Óli Arge úr Havn var hin fyrsti í danska ríkinum at keypa bilar úr Japan. Neyvan hevði hann ímyndað sær, at evropum fóru at dáma hesar bila so væl, at teir vórðu mest seldir bilar í fleiri evropiskum londum.

Í 1963 var ein blaðmaður á danska blaðnum Sjællands-Tidende - nevndur Knud Vilby og vitjaði í Føroyum. Hann legði til merkis allar bilarnar í lítla høvuðsstaði okkara og skriva áhugaverda grein, sum vit endurprenta niðanfyri.

Greinin lýsir væl bilstøðuna í Føroyum í 1963, men sigur ikki minni um, hvat ein vanligur dani helt um ferðsluna í Føroyum:

»Thorshavn er formentlig verdens mindste hovedstad. Selv om Færøerne har konge og udenrigspolitik fælles med Danmark, er færinger og danskere to helt forskellige ting, og det må være tilladt at regne Thorshavn for en hovedstad. I hvert fald gør færingerne det selv.

Men udenøs besøgende, som jeg, vil kunne skrive under på, at Thorshavn er en af verdens farligste hovedstæder at færdes i som fredelig fodgænger. Hverken London, Paris eller København har jeg sprunget så højt og så mange gane for livet, som i denne løjerlige by, der er en blanding af forunderlige, gamle huse med græstørv på taget og nye, moderne betonkoloser. Og som samtidig har de forunderligste snoede stejle og snævre gader, hvor de største og bredeste dollargrin fra bilfabrikker i hele verden farer igennem, medens fodgængerne må springe ned i de brede, åbne rendestene eller op på de maleriske stengærder, for fortove eksistere kun få steder.

Alle stillfærdige fodgængere ved, at værre end alle private bilister tilsammen, er hyrevognene. De dukker op fra alle sider, de kører stærkere end andre, og de kommer altid når man mindst venter det, undtagen da, hvis man tilfældigvis har brug for dem.

## Savna føroysku bilsøguna

EIRIKUR LINDENSKOV

Sum vit fyrr hava nevnt, so arbeiðir felagið Føroya Ellisakfør við at savna tilfar saman um føroysku bilsøguna.

Ætlanir eru um at geva tilfarið út í bók, men hetta er sera krevjandi arbeiði, av tí at lítið av slíkum tilfarið er savnað saman.

**Viðgera evnið í Sosialinum út at koyra**

Sum eina roynd at vekja áhuga millum manna fyri hesum arbeiði, er ætlanin at viðgera sama evni í Sosialinum út at koyra. Vit fara at prenta nakrar greinar um bilsøguna, og vóna á tann hátt at koma í samband við fleiri fólk kring landið, sum so kunnu vera felagnum Ellisakførum til hjálpar í savningararbeiðinum.

Er onkur, ið liggur inni við tilfari, veit okkurt at siga, ella veit onkran, ið kundi sagt eitthvørt um hetta evnið, eru tey vælkomin at seta seg í samband við Ellisakfør ella at venda sær til Sosialin út at koyra.

Δ